# Boblu í jólagávu



*Rúni W.Højgaard handar mammuni, Tórun Højgaard, lyklarnar til Bobluna*

*Mynd: Terji S. Johansen*

**Jólaaftan fekk Tórun Højgaard á Argjum ein bil í jólagávu frá soninum Rúna, sum lesur tónleik í Íslandi**

Ein jólagáva kann verða hvat sum helst, og tað eru ikki allar sum kunnu liggja innpakkaðar undir jólatrænum. Eina slíka gávu fekk Tórun Højgaard á Argjum. Hon fekk nevniliga eina VW Boblu í jólagávu frá soninum Rúna W.Højgaard.

Rúni visti, at mamman altíð hevur ynskt sær eina Boblu, og fekk hann tí hugskotið at keypa henni eina slíka. Hann leitaði á internetinum og fann hesa bobluna í Danmark. Rúni sigur, at hann gav eitt boð, sum hann ikki roknaði við at seljarin fór at góðtaka, men tað gjørdi hann. Fleiri Boblur vóru upp á tal, men eg eri glaður fyri, at tað bleiv hendan, sigur hann.

Boblan er frá 1974 og hevur 1,6 ccm motor við umleið 55 hk. Kilometurteljarin stendur á 47.000, men motorurin er skiftur, og hann hevur einans koyrt 20.000 km. Talan er um eina sonevnda Super Beetle, sum er eitt sindur fínari enn hinar, sigur Rúni.

Boblan kom til Føroyar við Norrönu fyri jól. Tað var ein vinmaður hjá Rúna, Búgvi Øster, sum lesur í Danmark, ið hevði bilin við heim í jólaferiu.

Tórun sigur, at hon visti einki um bilin, fyrr enn hon jólaaftan fekk ein flottan gávupakka við lyklunum til bilin, sum stóð í eini garasju í grannalagnum. Eg gjørdist sjálvandi ovfarin og skilti einki av tí heila, men eg eri glað fyri Bobluna, sigur hon.



# Talið av nýggjum persónbilum veksur

Nýggjastu hagtølini hjá Akstovuni vísa, at samlaða sølan av nýggjum akførum er vaksin við átta prosentum í ár í mun til í fjør.

Sølan av nýggjum persónbilum í Føroyum er vaksin við 18 prosentum. Í ár vórðu seldir 818 persónbilar í mun til 692 í fjør. Sølan av vørubilum minkaði við átta prosentum frá 93 bilum í 2009 til 85 í 2010.

Í ár vórðu seldir 19 hýruvognar í mun til 11 í fjør. Hagtøl fyri brúkt akfør vísa, at í ár vórðu 18 ellisakfør skrásett í mun til 6 í fjør. Ein lítil vøkstur er í søluni av motorsúkklum, meðan sølan av prutlum er minkað við næstan 50 prosentum.

**TOP-10**

| Bilmerki | Íalt |
|---|---|
| TOYOTA | 147 |
| CITROEN | 133 |
| FORD | 124 |
| SUZUKI | 64 |
| MITSUBISHI | 55 |
| HONDA | 45 |
| OPEL | 44 |
| VOLKSWAGEN | 44 |
| KIA | 42 |
| PEUGEOT | 37 |

*kelda: Akstovan*


Hósdagin 6. januar kl. 17.15

Í hesi fyrstu sendingini í ár verður vitjað hjá Auto Service, har prátað verður við Otto Andreasen, sølumann, um tveir bilar: Peugeot 3008 og Peugeot 5008, sum báðir eru flexsiblir og væl innrættaðir familjubilar.

Eisini er ein samrøða við Tórun Højgaard og sonin Rúna W. Højgaard, um VW Bobluna, sum Tórun fekk í jólagávu frá soninum. Ein samrøða við Ludvík Petersen verður endursend, har hann fortelur um sína Harley Davidson motorsúkklu við undirskriftini hjá fyrrverandi amerikanska forsetanum Bill Clinton á bensintanganum.




Vínnu- & bílradío á Rás 2